# POLITIKKUR FYRI BURÐARDYGD OG SAMFELAGSÁBYRGD

Útgáva 2 | Útgivin 01.01.2021 | Seinast dagførd 15.10.2025

J & K PETERSEN

## SKJAL 4. POLITIKKUR FYRI BURÐARDYGD OG SAMFELAGSÁBYRGD

### Endamál við politikkinum

Burðardygd og samfelagsábyrgd snúgva seg um at skapa javnvág millum umhvørvið, samfelagið og búskapin. Hetta merkir, at vit arbeiða á ein hátt, sum tryggjar, at komandi ættarlið fáa somu møguleikar og atgongd til tilfeingi, sum vit hava í dag.

Endamálið við hesum politikki er at lýsa, hvussu J&K Petersen arbeiðir miðvíst og skipað við burðardygd, og hvussu felagið tekur ábyrgd fyri ávirkan síni á menniskju, umhvørvið og samfelagið. Politikkurin skal stuðla undir eitt vinnulív, har ábyrgd, álítandi framferð og virðing fyri menniskjum og náttúru ganga hond í hond.

### Starvsfólk fevnd av politikkinum

Øll starvsfólk hjá J&K Petersen – íroknað fyribils sett starvsfólk og starvsfólk í parttíðarstørvum – eru fevnd av hesum politikki.

Leiðslan stuðlar virkin undir arbeiðið og hevur ábyrgd av, at politikkurin verður hildin. Eitt starvsfólk verður útnevnt til at hava samskipandi og leiðandi leiklut innan burðardygga og samfelagsliga ábyrgd hjá felagnum.

Øll starvsfólk skulu hava møguleika at fáa kunning og taka virknan lut í arbeiðinum við burðardygd.

### Karmar og gjøgnumskygni

J&K Petersen er limur í Varandi Vinna og arbeiðir eftir VSME-standardinum[1], sum er ein av karmunum fyri burðardygga menning innan føroyska vinnulívið.

Felagið skal altíð lúka føroysk lógarkrøv og virka í einum opnum og álítandi samstarvi við myndugleikar, stovnar og aðrar viðkomandi leikarar.

Vit leggja dent á gjøgnumskygni í okkara arbeiði og vilja við okkara royndum og úrslitum eggja øðrum at taka ábyrgd fyri mannarættindum, arbeiðarарættindum og umhvørvinum.

### Umhvørvisábyrgd (Environmental Responsibility)

Vit arbeiða fyri at minka um okkara ávirkan á náttúruna. Hetta fevnir um:

- Orku og útlát: Vit leggja dent á at nýta varandi orkukeldur og at arbeiða støðugt við at minka orkunýtslu og útlát.
- Tilfeingisnýtslu og burturkast: Vit miða eftir at minka um burturkast og at økja um endurvinning og endurnýtslu.
- Dálking og lívfrøðiligt margfeldi: Vit virða náttúruna og taka atlit til dálking, lívfrøðiligt margfeldi og náttúruvernd í øllum okkara arbeiði.

### Sosial ábyrgd (Social Responsibility)

Vit virða menniskju og arbeiðarарættindi og arbeiða fyri einum virðiligum og tryggum arbeiðsumhvørvi.

- Arbeiðsumhvørvi: Vit leggja dent á eitt trygt, rúmligt og rættvíst arbeiðspláss uttan mismun ella happing.

---

[1] VSME = *Voluntary reporting standard for Small and Medium-sized Enterprises*

- Førleikamenning: Vit stuðla førleikamenning og læru, soleiðis at starvsfólk kunnu mennast bæði fakliga og persónliga.
- Klaguskipan: Øll kunnu trygt boða frá, um tey meta, at okkurt er í stríð við politikkin fyri burðardygd og samfelagsábyrgd felagsins.

## Góður handilssiður og leiðsla (Governance)

Vit vilja ganga á odda við ábyrgd og heiðurligum handilssiði.

- Vit taka frástøðu frá mutri, óreiðiligari ávirkan og øðrum óheiðurligum atgerðum.
- Vit virða og verja mannarættindi og arbeiðarararættindi í øllum okkara samstørvum og verkætlanum.
- Vit stimbra eina mentan, har ábyrgd, álítandi framferð og opinleiki eru grundarlagið fyri okkara virki.

## Eftirlit og frásøgn

Árliga verður gjørd ein **ESG-frásøgn**[2], sum lýsir okkara arbeiði innan burðardygd og samfelagsábyrgd, við støði í VSME-standardinum. Frásøgnin gevur yvirlit yvir framstig, avbjóðingar og ætlanir fyri komandi árini.

Vit vilja við hesi frásøgn skapa gjøgnumskygni og tryggja, at arbeiðið við burðardygd er støðugt og áhaldandi.

## Endaligt lyfti

J&K Petersen tekur ábyrgd fyri síni ávirkan á menniskju, náttúru og samfelag. Vit vilja virka sum eitt fyrimyndarligt felag, sum gongur undan við ábyrgd, burðardygd og virðing – bæði innan byggivinnuna og í føroyska samfelagnum.

Sigtór Asbjørn Petersen

Stjóri, J&K Petersen

___________________________________

[2] ESG stendur fyri Environmental, Social og Governance